# Føroyskur streingjal

**Ummæli: Føroyskur gittartónleikur - Ólavur Jakobsen. Awake, my Soul, and Sound your Strings. Verk eftir William Heinesen, Jógvan Waagstein, Kára Bæk, Sunleif Rasmussen og Kristian Blak. Upptikin í 2010-2011, útgivin í 2012, TUTL Records**

Andrea Heindriksdóttir




Flestu kenna Ólav Jakobsen sum dugnaliga gittaristin og gittarlæraran, sum við sínum hugfarsliga lyndi hevur myndað føroyska tónleikapallin seinastu mongu árini. Ólavur hevur verið við á eini ørgrynnum av útgávum, men fløgan "Awake, my Soul, and Sound your Strings" er fyrsta soloútgáva hansara.

Ólavur var borin í heim í 1964 og er ættaður av Kamarinum í Havn. Íblástur hevur hann frá pápa sínum, sum framførdi tónleik eftir m.a. Chet Atkins og Hank Marvin. Í ungdómsárunum lurtaði Ólavur, sum onnur ung, eftir Led Zeppelin, The Beatles og Jimi Hendrix, men tað var ikki fyrr enn hann hevði hoyrt Andrés Segovia og seinni Sir Julian Bream, at Ólavur gjørdi av at royna seg sum klassiskan gittarist.

Ólavur byrjaði sína yrkisleið á Kongaliga Musikkkonservatoriinum í Keypmannhavn og las víðari í París hjá franska guitaristinum Roland Dyens.

Ólavur virkar í dag sum ávíkavist tónleikalærari og tónleikari. Umframt at vera ein av stovnarunum av klassiska tónleikabólkinum, Aldubáruni, hevur Ólavur øll árini verið ein av undangongumonnunum at fáa føroyskan tónleik út í heim og hevur framført ørgrynnu av konsertum bæði í Føroyum og úti í heimi.

## Awake, my Soul, and Sound your Strings

Fløgan "Awake, my Soul, and Sound your Strings" hevur eitt breitt úrval av nýskrivaðum og eldri føroyskum tónleiki, ið er gjørdur til gittar.

Fyrsta lagið á fløguni er eisini heitislagið og er eftir William Heinesen. Vit kenna helst verkið best sum gamla fólkalagið hjá Thomas Kingo frá 1674, "Vaag op og slaa paa dine strenge", sum William skrivaði í 1955 sum tema og 10 variatiónir fyri solobratsj. Á fløguni hoyra vit Ólav spæla verkið sera hegnisliga á sologittar. Á einfaldan og meistarligan hátt vísir Ólavur her síni tónleikaligu evni og sítt stóra yvirskot bæði tekniskt og musikalskt.

## Nýtt ljóð til gamalt

Ólavur hevur sjálvur lagt til rættis bæði tey fyrstu løgini á fløguni. Umskrivingarnar til gittar eru gjørdar á ein slíkan hátt, at einki verður tikið frá upprunaútgávuni - heldur verður lagt afturat, so tú fært eina nýggja dimensión aftur at upprunaligu kompositiónini,

Verkið Parafrasa hjá Jógvan Waagstein frá 1947 er gjørt yvir íslendska lagið "Ljómur". Hetta verkið er upprunaliga skrivað fyri orgul og hevur eitt sindur nýggjari tónamál enn fyrra verkið á fløguni. Her hoyrist, hvussu Ólavur letur ymisku urguljóðini í nýggjan ham og hegnisliga førir tey yvir á gittaran.

Gittarin hevur ikki sum útgangsstøði líka vítt spenni sum orglið, men við hesi frálíku útseting hevur Ólavur enn einaferð megnað at geva nýtt ljóð til gamalt verk.

## Musikkur og málningar

Triðja verkið á fløguni "Pictures" er skrivað av Kára Bæk í 2008/09. Verkið er í 11 satsum og tekur útgangsstøði í eini málningaframsýning. Hesin mátin at seta málningar og tónleik saman er kendur, men ikki av hesi orsøk minni áhugaverdur. Føroysku málningarnir, sum eru grundarlag undir verkinum, eru málaðir av Torbjørn Olsen, Frimod Joensen, Ingálvi av Reyni og S. J. Mykines.

Tónamálið hóskar sera væl til listabúnan í málningunum, frá tí naturalistiska til tað meiri abstrakta, og at enda til hugtunga tónleikamálið yvir stórverkið hjá Mykinesi frá 1934.

Ímillum satsirnar eru sokallaðar promenadur, sum binda satsirnar saman, eins og verkið á hóskandi hátt byrjar við intro og endar við postludium.

Í verkinum hjá Kára Bæk vísir Ólavur tónleikalig innlivingarevni, so lurtarin sær hugmyndina og kenslurnar í myndunum, sum tónleikurin framber. Eitt sera vælskrivað verk og ikki minni væl framført – ja eg vil siga eitt stórverk.

## Ótroyttar leiðir við Sunleivi

Sunleif Rasmussen er ein av okkara heilt stóru tónasmiðum. Eisini hann hevur skrivað fleiri verk fyri gittar, á hesi fløguni eru tey tvey. Fyrra verkið er skrivað í 2007 fyri tveir gittarar kallað "Caccia". "Caccia" merkir veiða, men er eisini kendur italskur tónleikaformur frá tíðliga í 1400 árunum, har samanseting av rødd í kanon formi er at hoyra.

Verkið er líkt øðrum verkum hjá Sunleifi, skrivað yvir ávísar samansettar skalar, spældir í ymsum polyrútmiskum mynstrum. Verkið er sera krevjandi at spæla og vísir eisini nýtt tónamál, eins og gittarspælið verður ført út á ótroyttar leiðir. Til tíðir hoyrast røddirnar við hjálp av serligari tøkni - serstakar og bertakandi. Tað er evnaríki fyrrverandi næmingur Ólavs, Alvi Joensen, sum spælir saman við honum. Spennandi verður at fylgja Alva í árunum, sum koma á tónleikaferð hansara – eitt er vist, hann hevur fingið gott í beinið.

Seinna verkið hjá Sunleifi er ein suita, sum er skrivað í einum formi sum ein baroksvita.

Satsirnar bera allir heiti frá dansum úr barokktíðini. Fyrst eitt Prelude, síðani Allemande, Courante, Sarabande og Gigue. Verkið byrjar í heldur traditionellum tónamáli, og fer so við og við yvir í nýggjari tónamál, har elektronikkur førir okkum yvir í heilt annað útrykk. Verkið er sera væl spælt, og stórt yvirskot skal til fyri at kunna framføra slíkt verk. Ólavur megnar hetta og vísir, hvussu ymiskliga ljóðið á gittaranum kann koma fram. Hann megnar við neyvleika at fáa allar smálutir við, smálutir, sum gera, at spælið verður fullkomið.

## Einastandandi fløga

Seinasta verkið á fløguni er skrivað av Kristiani Blak í 2005 og er kallað "40 mile ground".

Her hoyrist gittarin við øllum sínum møguleikum. Verkið leiðir okkum út í eina dreymasjón og spælir sær við okkara hugmynd, vón og væntan til tónleik. Tónamálið er serstakt, eins og Kristian Blak er serstakur, og vísir okkum á allar møguligar og ómøguligar tekniskar hættir í gittarspælinum, eins og samlag eru til fleiri ymsikar tónagreinir.

Aftur her vísir Ólavur, at hann megnar at flyta seg í tíð og tónleikastíli, kanska er tað hansara tónleikaliga bakgrund, sum hevur styrkt smidleikan í bæði spæli

# jómur á altjóða stigi



og útrykki, og hetta, saman við góðari læru og miðvísum arbeiði, ger Ólav Jakobsen til nakað heilt serligt.

Samanumtikið kann sigast, at fløgan er einastandandi væl úr hondum greidd. Fløgan hevur eitt serstakliga gott ljóð, sum danin Mikkel Nymand hevur ljóðblandað. Tað eru Pól Jakobsen og Jónas Bloch, sum hava staðið fyri upptøkunum, Sunleif Rasmussen er framleiðari, og Tróndur Bogason hevur saman við Jónasi Bloch klipt.

## Væl móttikin uttanlands

Myndirnar í húsanum er tiknar av Una Árting og lýsa væl føroysku náttúruna, gráa litin og grótið. Serliga vøkur er spegilsmyndin fremst á húsanum. Eisini er tekstilfarið, sum Hans Pauli Tórgarð hevur gjørt, væl úr hondum greitt. Verkini verða lýst, og málningarnir, sum liggja til grund fyri verkinum "Pictures" eftir Kára Bæk, eru eisini við í húsanum.

Nógv fyrreiking skal til fyri at lata slíka fløgu úr hondum, nógv og miðvís venjing, framførslur, upptøka - alt sera krevjandi.

Ólavur hevur við hesi útgáva lagt eitt megnarverk úr hondum. Nógv arbeiðið liggur eftir, og tað bæði hoyrist og sæst. Eisini er hugaligt at síggja, at fløgan hevur gjørt um seg úti í heimi, har ummælarar eru á einum máli um, at útgávan er ein dygdarútgáva á altjóða støði.

## Fløguummæli í Føroyum

Tað er alt ov sjáldan, at fløgur verða ummældar í Føroyum. Miðlarnir leggja upp til, at tilfar skal sendast inn, sum síðani verður brúkt í upprunalíki - oftast er eingin viðgerð av tilfarinum.

Áðrastani eru ummælarar innan flestu greinar fast tengdir at miðlunum, og á henda hátt ber til at hava fólk, sum meta um tað, sum verður borið fram.

Nøkur átøk hava verið gjørd at fáa fleiri fløgur ummældar í Føroyum, seinasta regluliga royndin var sendingin "Hvørnin" í Útvarpi Føroya, har eitt skikkað pallborð veruliga fór í djúpdina í teimum útgávum, sum vórðu umrøddar – ein frálík sending, sum tíverri ikki er til longur.

Vit hava ikki í Føroyum tradition fyri at ummæla, kanska tí landið er lítið og øll kenna øll.

Seinastu árini hevur føroyska tónleikalívið tó í stóran mun borið brá av høgum yrkisdugnaskapi, nógvir tónleikarar eru búsettir í Føroyum, og tí skuldi ikki verið trupult at fingið skikkaðar fløguummælarar.

Miðlarnir eru ofta sperdir í tíð, arbeiðsorku og fígging, og hetta er óivað eisini ein av orsøkunum til, at økið ikki verður raðfest.

Men so við og við sum føroyski tónleikapallurin mennist, má miðlapallurin eisini fylgja við, tí tað er eitt heilt náttúrligt samspæl millum hesi bæði.

Tað er altíð gott og gevandi at fáa afturljóð uppá arbeiði, og hetta er eisini galdandi hjá teimum, ið fáast við tónleik. Professionell ummæli eru vakstrarmøguleiki og eru við til at geva gott mót- og viðspæl til einstaka tónleikararan. Hetta er neyðugur lutur í føroyskum tónleikalívi og á framtíðar tónleikapallinum í Føroyum.

Heimurin gerst alt minni og minni, og tí ber væl til at menna tónleikavinnuna og knýta netverk uttanlands. Í hesum arbeiði eru tónleikaummæli týdningarmikil partur, tí á henda hátt ber til at fáa útbreiðslu og kunning um føroyskan tónleik og føroyskt tónleikalív.

Vit eiga nógvar dugnaligar tónleikarar, og fleiri eru ávegis á útbúgvingarleið. Vónandi flyta hesi heim aftur og gera sítt til at mynda komandi tónleikaættarliðið - eisini nýggjað ættarliðið av ummælarum.

## ÚTLENDSKIR MIÐLAR UM FLØGUNA

**Týska tíðarritið, Gitarre & Laute:**

*"Ólavur Jakobsen er ein sera sannførandi umboðsmaður fyri føroyskan tónleik"*

**Enska tíðarritið, Classical Guitar Magasin:**

*"Eingi fyrivarni eru, tá umrædur svitu fyri gittar og elektronikk eftir S. Rasmussen. Afturljóðið í Allemande-satsinum verður brúkt so gløgt og innhugsið, at tað næstan kundi verið fangað akustiskt"*

**Danska tíðarritið, Dansk Guitar Selskab**

*"Her er vissuliga talan um eina heilt sjáldsama fløgu við breiðum musikalskum spenni og einum tónleikara, sum ber meira fyri brósti, enn bert at undirhalda. Ólavur spælir við hjartalagi og nærveru og nemur innastu hjartastreingir"*

SETT UPP: JANUS E. MORTENSEN